# Vilja gerast meira sjónligir

**- Styrkin hjá mekaniska verkstaðnum er, at vit eisini reinsa og umvæla el-motorar og generatorar. Hetta kann í fleiri førum gera, at skipum ikki nýtist at liggja leingi og bíða, tá okkurt gongur galið. Leveringstíðin upp á generatorar kann vera upp í einar 2-3 mánaðir, sigur verkætlanarleiðarin á El-Talvuvirkinum í Gøtu, Petur Martin Glerfoss**

FAROEXPO 07
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

El-Talvuvirkið í Gøtu er millum føroysku veitararnar, sum verða við á FaroExpo, og hetta er eisini fyrstu ferð, at fyritøkan er við á hesi vinnustevnu.

- Vit hava sett okkum nøkur mál og hava lagt eina strategi, sum eitt nú byggir á at gera okkum meira sjónligar millum viðurskiftafólkini. Málið er í størri mun enn áður at vísa okkum á marknaðinum. Vit vilja eisini veksa um søluna av komponentum og ymiskum eykalutum til eitt nú el-motorar, generatorar, umformarar og ymiskar el-talvur og skipanir annars.

Tað sigur Petur Martin Glerfoss, sum er verkætlanarleiðari á El-Talvuvirkinum.

Sum navnið sigur, hevur El-Talvuvirkið spesialiserað seg í el-talvum og høvuðstalvum í ymiskum støddum og ymiskum slagi, bæði til skip, ídnaðin á landi og bygningar.

### Trý høvuðsøki

Petur Martin sigur, at virksemið hjá fyritøkuni er býtt upp í trý høvuðsøkir, har fyrsta økið er stórar høvuðstalvur, smærri talvur og ymiskar stýritalvur.

Felagið hevur eisini ein mekaniskan verkstað, sum er ein annar partur av virkseminum.

- Vit selja vælumtóktar el-motorar til ymiskar skipanir umborð á skipum og virkjum, eitt nú til bandskipanir. Vit útvega eisini generatorar av dygdargóðum merki, eins og generatorskipanir, pumpur til spillivatn, ymiskar vætur og annað.

Hann sigur, at styrkin hjá mekaniska verkstaðnum er eisini, at teir reinsa og umvæla hesar el-motorar og generatorar.

- Hetta kann í fleiri førum gera, at skipum ikki nýtist at liggja leingi og bíða, tá okkurt gongur galið.

Hann vísir á, at leveringstíðin upp á eitt nú generatorar kann vera upp í einar 2-3 mánaðir.

- Í staðin fyri, at skipini liggja og bíða, kunnu vit undir vanligum umstøðum umvæla ein generator eftir 2-3 døgum, sigur Petur Martin.

Triðja økið, sum El-Talvuvirkið í uppaftur størri mun hevur lagt seg eftir, er ymiskar instalatiónir, bæði í skip, virkir og bygningar annars.

- Tá ið ræður um fiskiflotan, hugsa vit mest um instalatiónir í samband við, at talvur skulu skiftast og instalatiónir gerast av nýggjum. Vit hugsa ikki í sama mun um instalatiónir í nýbygningar, tí hesar krevja nógva tíð og nógv fólk.



*El-Talvuvirkið hevur nýliga verið í Hetlandi og Orknoyggjum við el-talvum, sum settar eru upp í sambandi við Shelf-kaðalin hjá Føroya Tele*

### Fjarstýringar

Verkætlanarleiðarin vísir á, at El-Talvuvirkið nýliga hevur sett talvur upp og gjørt nýggjar installatiónir umborð á Róki og Lerki og umborð á nýbygingunum, sum Beta letur byggja í Spaniu. Í løtuni eru fólk hjá fyritøkuni í Gøtu í Spaniu og arbeiða umborð á nýggju skipunum.

- Okkara arbeiði hevur mest gingið fyri seg á dekkinum og í lastini, har vit hava sett tráleysar og vatntættar skipanir upp, sum kunnu gera arbeiði lættari, eitt nú við flutningi av fiski. Okkara skipanir eru fjarstýrdar og byggja á, at tær ikki skal nýtast at ganga og draga ein kaðal aftaná tær, tá tú arbeiðir og flytir teg við tólinum.

Petur Martin sigur, at El-Talvuvirkið hevur fólk, sum duga væl at programera, og soleiðis seta teir eisini ymiskar frekvensumformarar upp, sum gera manøvruna lagaligari og betri.

El-Talvuvirkið hevur eisini nýliga verið í Hetlandi og Orknoyggjum við el-talvum, sum settar eru upp í sambandi við Shelf-kaðalin hjá Føroya Tele.

### Fleiri eykalutir

Petur Martin Glerfoss sigur, at málið hjá El-Talvuvirkinum er at liggja inni við øllum eykalutum til tær instalatiónir, el-motorar, generatorar, talvur, kontaktir, sikringar og annað, sum fyritøkan fæst við.

- So seint sum í síðstu viku vóru boð eftir okkum, tá ein stórur avbrótari fór. Vit vóru á staðnum hálvan tíma seinni og skiftu avbrótaran, sigur hann.

Hann vísir á, at tað er kostnaðarmikið at liggja inn við stórari vørugoymslu, og tí er eisini umráðandi fyri El-Talvuvirkið at fáa eitt "flov" í søluna soleiðis, at tað betur kann loysa seg at liggja inni við hesum.

- Jú, størri sølan er, jú størri og bíligari ber til at keypa inn – og selja útaftur, leggur Petur Martin Glerfoss aftrat.



*Teir eru serkønir í at projektera el-anlegg, framleiða el-talvur, projektera og installera sjálvirkandi skipanir av ymiskum slagi*

## FAKTA

Á El-Talvuvirkinum í Gøtu eru teir serkønir í at projektera el-anlegg, framleiða el-talvur, projektera og installera sjálvirkandi skipanir av ymiskum slagi, viðlíkahalda el-kervið, viðlíkahalda generatorar, el-motorar og el-talvur.

Starvsfólkini hjá El-Talvuvirkinum eru el-installatørar, elektromekanikarar, skipselektrikarar og maskinmeistarar.



*Á El-Talvuvirkinum starvast el-instalatørar, elektromekanikarar, skipselektrikarar og maskinmeistarar*